# ASB fegnast um nýggjan sáttmála

**Á oljubasanum Atlantic Supply Base í Runavík er stjórin, Eli Lassen, bjartskygdur, nú felagið hevur fingið sáttmálan sum veitari við boringina hjá ENI, sum verður í føroyskum havbotni næsta ár**

Tíðliga í heyst gjørdist greitt, at Atlantic Supply Base í Runavík í kapping við aðrar útbjóðarar hevur fingið sáttmálan við ENI, sum er fyrrverandi Agip. Sáttmálin fevnir um alt arbeiði, sum er á basanum í Runavík, umframt tær veitingar og tænastur, sum ASB higartil hevur haft við undanfarnu boringar á føroyskum øki við ymisku oljufeløgini.

### Góður hýrur

Tá Sosialurin vitjaði á oljubryggjuni týsdagin, var hýrurin á stjóranum, Eli Lassen, góður.

Aftrat sær hendan dagin hevði hann tveir ungar menn á trucki, meðan ein triði maður hjálpti stjóranum at skipa fyri at fáa longu og tungu rørini út úr bingjum, sum komnar eru úr Meksiko umvegis Kollafirði og eru síðan fluttar higar.

- Eitt farmaskip kom úr Meksiko fyrr í heyst, og hevði ymiskt onnur rør við (sonevndu caisingrør). Hetta vóru aðrar støddir enn tey, sum vit hava lossað í dag. Hesi rørini eru uppskipað á útgerðarhavnini og skulu brúkast í boringini hjá ENI komandi ár. Nú tøma vit tær fýra bingjurnar og leggja rørini upp á pláss á havnalagnum, sigur stjórin, Eli Lassen.

Í løtuni hevur hann fýra tjúktir av caising-rørum liggjandi á bryggjuni, og tvær tjúktir koma aftrat, áðrenn byrjað verður at bora, men hesar koma neyvan fyrr enn beint undan boringini.

### Hjálpandi hond

- Vanliga eri eg einsamallur til arbeiðis á ABS tá ið eingin aktivitetur er, men tá slíkar uppgávur skulu loysast, er neyðugt við fólki til hjálpar, sigur hann.

Bæði Eli og hjálparmaður hansara á bryggjuni hendan dagin høvdu hjálm á høvdinum, og sum tíðindamaður slapp eg heldur ikki undan hesa løtu, eg steðgaði.

- Jú, eg haldi, at menn innan oljuvinnuna eru rættiliga spentir upp á komandi boringina. Teir siga, at møguleikin fyri at finna olju er 1/3, sum teir rópa tað, og møguleikin at finna olju í rakstrarverdum nøgdum er 1/10. So, vit eru sjálvsagt eisini spentir og vóna tað besta, nú ENI næsta ár fer at seta borin í havbotnin, sigur stjórin.

### Væl nøgdir

Eli Lassen sigur, at feløgini, ið ASB sum veitari higartil hevur samstarvað við, hava verið sera væl nøgd við tænastuna, og tey eru eisini væl nøgd við umstøðurnar inni á Skálafjørðinum.

- Eg havi sjálvur verið sjómaður, og eg veit, hvat man væntar sær. Tí hevur tað alla tíðina verið mítt mál at veita okkara samstarvspørtum somu tænastu, sum eg hevði vilja fingið, tá eg eri í útlendskari havn.

Eli sigur, at hesaferð er skipað soleiðis fyri, at eitt sokallað "team" verður reist á føtur, sum oljufeløgini kunnu ringja til, tá tørvur er á einum ella øðrum.

- Vit hava skipað so fyri, at tað verður ein bíleggingarskrivstova/ordrakontór, sum kemur at taka ímóti boðum og kemur at taka sær av, at eftirspurdu veitingarnar koma upp á pláss.

Stjórin vísir á, at sjálvandi liggur ASB ikki inni við allari útgerð og øllum tænastum, sum hugsast kunnu, men felagið fer at syrgja fyri, at hesar eru tøkar, tá brúk er fyri teimum.

### Eingin slaking

Eli Lassen mælir annars føroyskum myndugleikum til ikki at slaka í teimum krøvum, ið oljufeløg, sum virka í føroyskum øki, arbeiða undir.

- Í Hetlandi hevur man at kalla mist alt á gólvið, men tað mugu vit syrgja fyri ikki hendir í Føroyum. Tey krøv, sum vit seta, skulu bert skiljast sum hjálp til sjálvhjálp - skilt á tann hátt, at jú betur vit føroyingar eru til at loysa allar uppgávur, jú tryggari kunnu oljufeløguni føla seg, sigur stjórin, Eli Lassen.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit eiga ikki at linka treytirnar mótvegis oljufeløgunum, sum virka í okkara øki. Í Hetlandi hevur man at kalla mist alt á gólvið. Tað má ikki henda í Føroyum, sigur Eli Lassen, stjóri á Atlantic Supply Base í Runavík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hansa Fredriksberg av Toftum tekur sær av teymunum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

*Framhald av síðu 15*

## … Føroysk fyrstafloks lína og teymar úr Søldarfirði

men sum síðan eru farin aftur á síni pláss í framleiðsluni, meðan eg og Martin hava spákað runt og práta, eru Klement Túgvustein úr Æðuvík, Hansa Fredriksberg av Toftum og Joanna Hansen av Nesi.

Klement og Hansa fáast við teymar, meðan Joanna klipsar svøvlar upp á línuryggin.

### Á djúpari vatni

Meðan vit ganga runt og hyggja at virkinum, kemur Heri Jacobsen av Toftum eisini inn á gólvið. Heri er ikki við í sjálvari framleiðsluni, men tekur sær av sølu úti í skipshandlinum Teymar í Runavík.

- Heri er eisini kontaktpersónurin til skipini, sigur Martin.

Tjúksti línuryggur, sum Teymavirkið framleiðir við svøvlum, er 9 mm.

- Hendan línan er vorðin meira eftirspurd millum føroyskar línumenn, nú lítil toskur er at fáa, og skipini leita sær niður á djúpari vatn at royna eftir brosmu og longu.

Martin vísir annars á, at felagið nýliga hevur havt eina rímiliga stóra levering av teymum til Noregi, eins og ikki so fáir føroyskir línu-og útróðrarbátar, sum eru farnir til Grønlands at royna, havt keypt sær útgerð á Teymavirkinum.

- Vit eru nógv tann størsti útbjóðarin og veitarin av línureiðskapi í Føroyum og selja soleiðis ein stóran part av útgerðini til føroysku línuskipini og útróðrarbátarnar.

Hann sigur, at línuryggurin, sum virkið framleiðir, er samansettur úr ymiskum tilfari, men polyester er ein týðandi partur í framleiðsuni.

- Allir teymarnir verða framleiddir úr polyester, og hesir eru sera væl dámdir, tí teir eru væl snúraðir við góðum strekki, sum hann tekur til. Hetta ger, at teymarnir eru stívir og standa væl út frá línurygginum, sum aftur ger, at teir ikki so skjótt snúðrast um ryggin.

### Rávøra í stórum

Teymavirkið keypir rávøruna í stórum. Hon kemur vanliga í 40 føt bingjum, og tilfarið í eini slíkari bingju liggur vanliga um eini 26 tons hvørja ferð.

- Tilfarið hevur sín uppruna úr Kina, men verður keypt um ymiskar veitarar í eitt nú Danmark og Niðurlondum.

Martin Johannesen sigur, at øll skipslínan verður impregnerað, men tað verður línan hjá útróðrarbátunum vanliga ikki.

- Impregneringin ger, at línan heldur sær nógv betur, og hon heldur sær eisini nógv reinari, sigur tekniski leiðarin, tá vit vitjaðu á Teymavirkinum mánadagin.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*